SKJHL A

Kommunufelagið

Fíggjarmálaráðið og
Almannamálaráðið

Dagfesting
15. november 2019

Okkara j.nr.
19/07

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr. 19/

**Lógaruppskot um broytingar í pensjóns skipanini**

Kommunufelagið fekk mánadagin 4. november 3 lógaruppskot til hoyringar. Talan er um fylgjandi uppskot:

1. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (lækking av mótrokning)
2. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum (Hækking av grunduppphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd)
3. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)

Hoyringsfreistin er 15. november 2019 kl. 15.00.

Fyriliggjandi uppskot eru sostatt send til hoyringar eftir, ella samstundis sum tey eru løgd fyri løgtingið 4. nov. 2019. Hoyringsfreistin er 15. nov. 2019 ella tveir dagar eftir at 1. viðgerð varð 13. nov.

Kommunufelagið vil innleiðandi vísa á, at landsstýrið við hesum brýtur allar vanligar mannagongdir viðvíkjandi lógarsmíði, og ikki livir upp til tær meginreglur, sum tað sjálvt hevur orðað.

Endamálið við at senda uppskot til hoyringar er at fáa greiðu á, *hvørja støðu almennir og kommunalir myndugleikar, stovnar, vinnulív, áhugafeløg, borgarar o.o., sum verða ávirkað av lógaruppskotinum, hava til uppskotið, fyri at stjórnarráðið kann gera eina meting av, um lógaruppskotið tøkniliga og innihaldsliga í roynd og veru er í lagi*[1]

Somuleiðis verður sagt at, "*ummæli hava eisini týdning fyri metingina hjá Løgtinginum av, um uppskotið er gagnligt*"

---

[1] Løgbiti 7; At senda til ummælis, https://www.lms.fo/fo/arbeidsoki/logarsmid/logbitar/ Sí eisini rundskriv um lógarsmíð, Løgmansskrivstovan 2019.

Tað er eisini umráðandi at seta eina hóskandi ummælisfreist, soleiðis, at ummælispartarnir fáa stundir at seta seg inn í uppskotið. Ásett er, at ummælisfreistin ikki eigur at vera styttri enn 4 vikur.

Lógararbeiðið hjá landsstýrinum livur í hesum føri á ongan hátt upp til ásetingarnar omanfyri, og slík mannagongd ger, at tað snøgt sagt ikki ber til at gera eina nøktandi, ítøkiliga meting av, um lógaruppskotini tøkniliga og innihaldsliga í roynd og veru er í lagi, og hvørt tey samanumtikið eru gagnlig.

**Meginreglur um greitt ábyrgdarbýti tileinkisgjørdar**
Tað er eisini hugstoytt at uppliva, hvussu lítla virðing landsstýrisfólk og Løgting hava fyri sjálvræði kommununar og fyri teimum meginreglum, sum eru galdandi fyri eitt greitt uppgávubýti millum land og kommunur.

Grundgevingar so sum, "at kommunurnar hava havt stóran inntøkuvøkstur", og "at kommunurnar eisini mugu geva lættar", verða í fullum álvara brúktar sum undanførslur fyri at gera seg fíggjarliga inn á kommunala geiran.

Fleiri av teimum álitum, sum landið hevur latið gjørt seinast árini, hava tilskilað nærri, hvat eitt greitt ábyrgdarbýti millum geirarnar er.

Í sonevnda Grøna Álitinum frá 2001 verður fyrsta meginregla fyri einum greiðum ábyrgdarbýti orðað soleiðis:

Meginregla 1:
"*Er ein uppgáva kommunal, so skal kommunan fíggja hesa uppgávu, og er tað harafturímóti ein landsuppgáva, so skal landið eisini fíggja hesa uppgávu. Hetta hevur við sær, at bara tey, ið taka avgerðir, kunnu áleggja sær sjálvum fíggjarligu ábyrgdina av avgerðunum. Tryggjast skal, at tey, ið hava ábyrgdina, ikki kunnu sleppa sær undan við onki at gera, ei heldur at leggja útreiðslur á onnur við at lata standa til. At uppgávur og ábyrgd fylgjast ger, at borgarin betur er førur fyri at skyna á, hvat tað kommunala virksemið í roynd og veru kostar. Við hesum kann borgarin seta strangari krøv til nýtsluna av skattakrónum sínum.*" (Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, 2001, s. 83.)

Í álitinum "Kommunur, eindir og uppgávur" frá 2009 verður týdningurin av einum greiðum ábyrgdarbýti millum geirarnar eisini undirstrikaður:

"*Eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti er týdningarmikið í einum umboðandi fólkaræði sum okkara. Landspolitikarar og kommunupolitikarar eru ofta í kapping um at taka sær æruna av teimum framstigum, ið henda, og somu politikarar eru skjótir at lasta hvønn annan fyri tað, sum virkar minni væl. Veljarin eigur í einum fólkaræði at kunna krevja politikararnar til ábyrgd fyri førda politikkin. Men í eini skipan við ógreiðum og umskarandi heimildum veit veljarin ikki, hvør politisk og umsitingarlig eind – land ella kommuna, ið er rætti myndugleiki at rætta mistøk.*

*Lokalpolitikarin og landspolitikarin turka av upp á hvønn annan, og borgarin stendur á berum. Ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti er eisini tvørrandi og uppslítandi fyri samstarvið millum land og kommunur*" (Kommunur, eindir og uppgávur 2009, s. 53.)

Júst omanfyri nevnda brot verður endurtikið og brúkt sum fremsta grundgevingin fyri at leggja eldraøkið út til kommunurnar. (sí, Løgtingsmál nr. 64/2013: Uppskot til løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. s,6).

**At lóggeva niður í kommunukassarnar**
Tað er vónleyst at meta neyvt um samlaðu fíggjarligu avleiðingarnar av fyriliggjandi uppskotum, tá skotbráið er so stutt, og tá landsstýrið so dánt roynir at lýsa fylgjurnar av lógaruppskotunum. Tað er bert tingmál nr. 20/2019, "uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti", sum ítøkiliga vísir, hvørjar fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum eru.

Skattalættin kemur at kosta kommununum 12 mió. kr. í 2020 og 12 mió. kr. afturat í 2021, t.v.s. 24 mió. kr. um árið, longu í 2021. Saman við tingmáli 12/2019 (Frádráttur til lærlingar á 50.000 kr.) leggur landsstýrið upp til, at Løgtingið skal samtykkja skattalættar á 34 mió. kr. beinleiðis úr kommunukassunum. Við hesum, saman við skattalættanum til fyritíðarpensjónistar, sum undanfarna Løgting samtykti, hevur Løgtingið seinast 2 árini samanlagt samtykt lættar fyri omanfyri 60 mió. kr. beinleiðis úr kommunukassunum, uttan at kommunurnar hava fingið høvi til at ávirka ella sjálvar at taka støðu til hesa raðfesting av kommunalum skattakrónum. Hesar 60 mió. kr. kundu verðið brúktar til at raðfest øki, sum kommunurnar vara av, t.d. dagstovna- ella eldraøkið. Ella kundu 60 mió. kr. verið latnar beinleiðis sum skattalætti til allar borgarar í kommununum.

Í hesum sambandi er eisini neyðugt at undirstrika, at allir lættar nevndir omanfyri saktans kunnu verða fíggjaðir av landskassanum burturav, um vilji og hegni var til tess hjá landsstýri og Løgtingi.

**Haldføristrupulleikin hjá kommununum**
Í fleiri umførum hava Búskaparáðið og landsstýrið sjálvt (seinast í uppskotinum til pensjónsnýskipan 2020) víst á, at føroyska samfelagið kemur at hava ein haldføristruppulleika orsaka av demografisku avbjóðingum, sum liggja fyri framman.

Gongdin hevur við sær, at samlaða talið av fólki, ið eru 67 ár og eldri, fer at vaksa úr núverandi 8000, upp í umleið 12.500 í 2040. Hetta merkir, at aktuelli skattalættin sum í 2021 kostar 24 mió. kr., tá fer at kosta kommununum omanfyri 37 mió. kr. um árið.

Frá umleið 2023 byrja stóru árgangirnir at gerast 80 ára gamlir, og hetta hevur við sær, at eisini talið av fólki 80 ár og eldri fer at vaksa væl skjótari enn í dag.

Í dag eru umleið 2.200 fólk, ið eru 80 ár og eldri. Væntandi veksur talið upp í næstan 6.000 næstu 20 árini. Talið av fólki 90 ár og eldri fer væntandi at fýrfaldast úr núverandi 400 og upp í 1.600 fólk sama tíðarskeið.[2]

Havandi í huga, at vit gerast alt meira røktarkrevjandi, so hvørt sum vit eldast, so kunnu kommunurnar væntast at fáa ein munandi útreiðsluvøkstur í mun til tænastur á eldraøkinum komandi árini

Um vit samstundis hava í huga, at lutfallið millum tey, sum eru á arbeiðsmarknaðinum og tey í pensjónsaldri, broytist frá 4,1 í dag til 2,4 komandi árini, og at tænasturnar hjá kommununum í stóran mun eru fíggjaðar við lønarskatti, so er tað eyðsýnt, at kommunali geirin stendur fyri álvarsligum fíggjarligum avbjóðingum.

Tá ið skiftandi landsstýri harumframt áhaldandi gera raðfestingar, sum kosta kommunala geiranum 10 tals milliónir krónur afturat hvørt ár, so er eisini eyðsýnt, at kommunali geirin stendur fyri hóttafalli.

Kommunufelagið fer tí við hesum at heita á landsstýrið og Løgtingið um at vísa framtíðar fíggjarliga haldførinum hjá kommununum í Føroyum størri ans, og saman við kommununum arbeiða við heildarloysnum, sum hava atlit til bæði inntøkur og útreiðslur hjá kommunala geiranum, heldur enn bert – einsæris, og uttan heild og samanhang – at koma við uppskotum, sum minka um inntøkurnar og økja um útreiðslurnar hjá kommununum. Í sjálvdrátti at raðfesta grundarlagið undan kommunukassunum, heldur enn at fíggja politikkin á egnum ábyrgdarøkjum úr egnum kassa, er lítið virðiligt og enn minni uppbyggjandi.

Kommunalu tænasturnar eru fyrst og fremst fíggjaðar við persónsskatti. Økjast útreiðslurnar munandi, samstundis sum inntøkugrundarlagið minkar, so er bert ein vegur – at einstaki borgarin rindar meira í kommunuskatti. Tá er einki vunnið.

Eitt annað, sum eisini er galdandi viðvíkjandi lættanum, sum nú verður latin fólkapensjónistum, og lættanum sum undanfarna landsstýrið lat fyritíðarpensjónistum, er, at hetta rakar meinast øki og kommunur, sum frammanundan hava eitt lutfalsliga veikt inntøkugrundarlag. Í Føroyum hava vit harumframt valt at skatta pensjónir við inngjaldi; tað merkir, at framtíðar pensjónistar ikki, ella bert í øgiliga lítlan mun, koma at gjalda skatt.

Hesin haldføristrupulleikin hjá kommunala geiranum verður ikki nevndur yvirhøvur, og tí valla tikin í tí stóra álvara, hann krevur.

**At enda**

Vit vilja enn einaferð heita á Løgtingið og landsstýrið um at taka støðuna í størri álvara og geva hesum trupulleikanum ans.

---

[2] Uppskotið til pensjónsnýskipan 2020, s 16.

Hendan gongdin kann ikki halda fram, uttan at kommunurnar fáa lut í øðrum inntøkum í samfelagnum.

Verður hetta ikki gjørt, so noyðast kommunurnar at niðurlaða ella fække um tænastur til børn og eldri, og trýstið á familjurnar fer at gerast alsamt størri, tí skattatrýstið í kommunala geiranum fer at vaksa munandi, samstundis sum minni partur av borgarunum í kommununi fer at gjalda nevnivert av kommunuskatti.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm

Formaður

Eyðun Christiansen

Stjóri